# Hjá royndu monnunum telur bara fremsta plássið

**Manningin á Havnarbátinum er so mikið roynd og sigursrík, at teir síggja næstfremsta plássið sum fyrsta tapara plássið**


*Tað stóð nógv á, men Havnarbáturin vann ársins fyrsta 10-mannafarsróður, og gleðin um hetta var sjónlig eftir skotini á málinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

10–MANNAFØR
*Jóannes Hansen*

Næstfremsta plássið er fyrsta taparaplássið. Tað staðfestir bátsformaðurin á Havnarbátinum, Magni Brøðraberg. Tað er einki reyp í útsøgnini. Heldur boðar hetta frá, at tá ið rógvararnir eru so royndir, sum teir eru umborð á Havnarbátinum, og tá ið teir hava vunnið so nógv, so er tað bara sigurin, sum telur.

Tá ið Havnarbáturin leygardagin vann ársins fyrstu kapping, var yngsti maður umborð 24 og tann elsti 34 ár. Síðani í fjør hava teir skift tríggjar út. Tveir av teimum, sum eru komnir umborð, hava áður verið partur av manningini, og hin triði hevur eisini róð nógv.

– Tað er kapping um at sleppa upp í part umborð á Havnarbátinum. Tá ið bátarnir verða mannaðir í januar, verður fyrst kannað, hvussu nógvir av teimum, sum vóru við í fjør, ætla sær at halda fram. So verður tosað um, hvørjir møguleikar eru fyri nýggjum fólki. Tað kann væl vera, at onkrir verða vónsviknir, tí tað ikki er pláss fyri teimum umborð á 10–mannafarinum. Men so mugu teir rógva við onkrum øðrum báti og so vóna, at tað verður pláss fyri teimum eitt annað ár, sigur Magni Brøðraberg.

Sigurin leygardagin var tann fimti á norðoyastevnu hjá bátsformanninum á Havnarbátinum. Magni vann við Gongurólvi í 1995 og 1996, við Ørvi í 1999 og við Havnarbatinum í fyrraárið og aftur í ár.

### Nólsoyingurin leingi fremstur

Tað kappaðust bara fýra 10–mannafør í Klaksvík. Tey lógu tætt saman vestarlaga í róðrarøkinum. Allir bátarnir vóru við til at mynda róðurin. Tá ið teir komu á mál var ongastaðni leyst millum bátarnar.

– Nólsoyingurin fekk besta startin. Róðursmaðurin hjá okkum segði okkum skjótt, at vit vóru aftanfyri Nólsoyingin, og at hinir vóru aftanfyri okkum. Tá ið vit komu inn á bedingina, tóku við Nólsoyingin. Kanska var tað meiri tað, at teirra bátur ikki gekk so væl á síðsta teininum.

Tað tóktist sum um Eysturoyingurin hevði hug at bjóða av í endaspurtinum, men formaðurin á Havnarbátinum kendi seg ikki hóttan av honum:

– Vit sóu aftur á Eysturoyingin um stýriborð. Hann gekk væl síðsta partin av teininum, men eg haldi, at vit alla tíðina kendu tað, sum um vit høvdu tak á honum.

Vestmenningur var aftastur alla tíðina, og fjarstøðan frá honum og fram til Nólsoying var á málinum størri, enn hon var millum hinar bátarnar. Serliga millum Eysturoyingin og Nólsoyingin var munurin sera lítil.

# H71 myndar manningina á Ørvi

**Bátsformaðurin heldur, at samanspælið millum hondbólt og kappróður riggar stak væl**

8–MANNAFØR
*Jóannes Hansen*

Bátsformaðurin á Ørvi eitur Halgir Dahl Olsen. Tað er eitt kent navn í hondbóltinum. Hann er stórskjútti hjá H71 í 1. deild, og hann hevur eisini roynst væl á hondbóltslandsliðnum. Tá ið vit ynskja honum tillukku við sigrinum í kappróðrinum millum 8–mannafør leygardagin og fregnast eftir, hvør rør saman við honum, fæst at vita, at tað eru nógvir H71 arar umborð á Ørvi:

– Seks av teimum níggju, sum eru við til at manna bátin, spæla hondbólt við H71. Tað er ein fín kombinatión at spæla hondbólt um veturin og at rógva um summarið. Harvið er grundkonditiónin støðugt góð. Í mars og fyrst í apríl má leggjast væl til rættis, soleiðis at tað gongur upp við venjingini í hondbólti og kappróðri, men tað ber væl til, tá ið so nógvir so at siga eru í sama báti, heldur Halgir Dahl Olsen.

Bátsformaðurin á Ørvi er royndur rógvari. Hann var við Havnarbátinum í 2000 og 2001, og hann var við Ørvi í 1999. Tveir av bátsfeløgunum hava ongantíð róð áður, tveir vóru við Drekanum í fjør, og róðursmaðurin róði við Drekanum í fjør.


*Hoyvíkingarnir á Ørvi skúgvaðu alla mótstøðu til viks, tá 8-mannafarsróðurin var á skránni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ørvur fekk fínan start, og tað var ongantíð nakar ivi um, at hann var fremstur:

– Argjabáturin, sum ikki var so langt frá okkum, var skjótt hálva aðru bátslongd aftanfyri okkum. Kvívíkingur var heilt í hinum borðinum, og stýrimaðurin visti skjótt at siga, at vit eisini vóru frammanfyri hann. Tí róðu vit alla tíðina lunnaróður. Tað var ikki neyðugt at spurta, tá ið vit nærkaðust málinum.

Væntar tú, at munurin fer at verða eins stórur hvørja ferð?

– Heilt víst verður hann ikki tað. Vit vóru eystari á enn kappingarneytarnir. Tí komu vit fyrri í kyrrari vatn. Kanska róðu vit einar hundrað metrar meiri á sløttum enn t. d. Kvívíkingurin. Millum annað tí bestu bátarnir á norðoyastevnu fara at liggja undir liðini á hvørjum í næstu kappingunum, fer munurin millum bátarnar at minka, og vit rokna við longu annað vikuskiftið, at kappingin verður væl harðari, enn hon var hjá okkum á norðoyastevnu, heldur bátsformaðurin á Ørvi.

# Besta úrslitið hjá Havnini síðani 1974

**Møguleikin fyri kvalifikatiónsróðri undan norðoyastevnuni hevur verið uppi og vent aftur, eftir at tos um plaseringar í róðrarøkinum tók seg upp aftur eftir róðurin í Klaksvík**



KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Høvuðsstaðurin fór við fimm av seks sigrum í fyrstu FM kappingini, sum var í Klaksvík leygardagin. Og tað var um reppið, at allir seks vinnararnir vóru úr høvuðsstaðnum. Smyril úr Vági syrgdi fyri, at ikki allir vinnararnir vóru úr Suðurstreymi. Blikur av Argjum vann genturóðurin, og vinnararnir í fýra kappingum – 5-mannafør dreingir, 6-mannafør kvinnur, 8-mannafør og 10-mannafør – vóru úr Havnar Róðrarfelag. Avrikið hjá HR minnir ikki so lítið um 1996, tá ið fýra manningar hjá HR vunnu FM.

Talan var leygardagin um besta úrslitiðå hjá Havnar Róðrarfelag í Klaksvík síðani í 1974. Tá var bara kappast í fýra róðrum – 6-mannaførini vóru ikki farin at kapprógva tá. Sílið vann við dreingjum og gentum, Ørvur vann kappingina millum 8-mannaførini og Havnarbáturin vann eisini.

Ta ferðina var oysandi regn í Klaksvík. Leygardagin kendist úr honum. Líkindini vóru einki serlig úti á Vánni.Frá Kósini av og inn á málið var tað ikki so galið. Landssynningurin bar við sær, at tað skjótari gjørdist slættari hjá bátunum, sum lógu eystari.

Neyvan nakar ivast í, at talan var um røttu vinnararnar. Í kappingunum, har eystastu bátarnir vunnu, var fjarstøðan frá teimum fremstu og til teir næstfremstu ógvulliga stór. Kortini varð fleiri ferðir havt á munni millum róðrarhugað leygardagin, at tað var spell, at umstøðurnar ikki vóru heilt tær somu at kappast hjá fremstu bátunum. Møguleikin varð aftur nevndur at skipa fyri kvalifikatiónsróðri undan norðoyastevnuni, soleiðis at tað eisini í fyrstu FM kappingini skal bera til at leggja favorittarnar undir liðini á hvørjum øðrum og miðskeiðis í feltinum.

Tá ið Smyril kom á Havnina leygarkvøldið var skipað fyri móttøku fyri nógvu vinnarunum úr Suðurstreymi, og Smyril úr Vági fekk eisini stórfingna móttøku, tá ið hann kom suður.

Nú eru manningarnar farnar at fyrireika seg til næstu FM kappingina, sum verður á Strondum annan leygardag. Á Fjarðarstevnu, sum nýggja FM kappingin verður nevnd í kappróðrarskipanini.



# Lærlingarnir eru sannir sveinar

**Hóast teir higartil bara hava verið í bátinum í vikuskiftinum, so eydnaðist tað vágbingum á síðstu metrunum at stríða seg framum Jarnbard**


*6-mannafarsróðurin hjá monnum gjørdist sera spennandi, og við einum øgiligum spurti eydnaðist tað Smyrli at vinna seg fram um Jarnbard*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

6–MANNAFØR MENN
*Jóannes Hansen*

6–mannafarið Smyril við monnum er kappróðrarstoltleikin hjá suðuroyingum. Men tað sæst einki til bátin á Vágsfirði fýra tey fyrstu kvøldini í vikuni. Tá stendur báturin í neystinum, meðan manningin drívur á at venja í Fragd og Fimi í Havnini.

Manningin er tann sama, sum hon var í fjør. Talan er um handverkaralærlingar. Teir standa í plátusmíð og elektrikaralæru í Vági. Seinastu seks vikurnar hava teir verið á tekniskum skúla í høvuðsstaðnum. Uppundir jóansøkuna verður skúlaskeiðið liðugt. Tá fara teir at venja uppaftur meiri umborð á Smyrli, enn teir hava gjørt higartil. Men sambært bátsformanninum hevur tað kortini ikki verið heilt einki.

– Vit fara suður fríggjadag. Hesar seinastu vikurnar eru vit farnir so at siga beinleiðis í bátin. So hava vit vant eina ferð og onkra ferðina tvær ferðir leygardag, og so aftur sunnudag, áðrenn vit eru farnir norður aftur, sigur Jóhan Sofus Müller.

Yngsti maður umborð á vinnarabátinum á norðoyastevnu er 20 ára gamal, og tann elsti er 26 ár.

Í fjør var Smyril nummar tvey á norðoyastevnu. Leygardagin sá tað leingi út, sum um hann eisini hesa ferð skuldi verða næstfremstur.

– Vit fingu ógvuliga vánaligan start. Tað var so ófantaligt í sjónum, at teir í stýriborð noyddust at rógva alla tíðina fyri at halda honum uppí. Kanska vóru vit eisini eitt sindur ókonsentreraðir, tá ið startskotið varð loyst av. Vit ruku afturum. Men so við og við gekk betri, og tá ið stýrimaðurin segði, at tað ikki vóru fleiri enn tvær bátslongdir fram til Jarnbard, kendist tað sum um vit fingu mót av nýggjum. Tá ið vit fóru um málið, hildu vit, at vit høvdu verið akkurát ov stuttir. Men so sóu vit, at viðhaldsfólkini hjá okkum á bryggjuni fegnaðust, og tað boðaði jú frá góðum, sigur Jóhan Sofus Müller.

Jarnbardur var leysur av hinum á 1000 metra málinum. Tað var ikki fyrrenn á Kósabrúnni, ella tá ið tveir triðingar av teininum vóru lagdir afturum, at fyrstu ábendingarnar vóru um, at tað kanska fór at gerast spennandi, og so var.

Hjá Páll Fanga, sum vann á norðoyastevnu í fjør, royndist tað syndarliga illa í heimasjógvi. Páll Fangi var næstaftastur, og teir vórðu tiknir av nýggja Sundabátinum, sum ikki hevur vant eins nógv og klaksvíkingar hava.

# Halda fram har tær sleptu

**Í fjør vunnu tær allar róðrarnar við Sílinum, og nú stóðu tær seg í fyrstu royndini umborð á Gongurólvi**

6–MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Í fjør skalaði eingin gentumanningini á Sílinum. Tær vunnu allar seks FM róðrarnar, og sigrarnir vóru rættuliga sannførandi.

Nú er størri parturin av tí manningini farin umborð á 6 mannafarið hjá Havnar Róðrarfelag, sum eitur Gongurólvur.

– Tað er einki aldursmark hjá gentubátunum, so vit kundu havt hildið fram við Sílinum. Men allar tær, sum í fjør vóru við til at manna Gongurólv, fóru av, og so valdu vit at taka við nýggju avbjóðingini. Vit eru fýra, sum í fjør róðu við Sílinum, og sum nú rógva við Gongurólvi. Hinar báðar hava róð nógv fyrr, og stýrimaðurin hevur eisini nógvar royndir.

Hetta sigur Inga Thorkildshøj. Í fjør var hon bátsformaður á Sílinum, og nú er hon bátsformaður umborð á Gongurólvi.

Í fjør var Jarnbardur suverenur FM vinnari. Tær vunnu allar róðrarnar. Á norðoyastevnu var einki at síggja til Jarnbard við kvinnumanning. Fleiri av teimum, sum róðu í fjør, eru farnar av landinum, men kanska fara tær at luttaka seinni í summar.


*Har var eingin ivi um, hvør var fremsti báturin í kvinnuróðrinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Páll Fangi fekk besta startin leygardagin, og fyrstu løtuna lógu tær í Klaksvík fremstar.

– Vit royndu tað, sum vit kundu. Stýrimaðurin hjá okkum segði, at vit vóru fremstar, tá ið okkurt um hálvt málið var rógvið, og so longdist munurin aftur til hinar, sigur Inga Thorkildshøj.

Gongurólvur lá eystarlaga. Tað hoyrdist leygardagin, at tað glapp hjá teimum á tí teininum, tá ið tær høvdu lívdina, sum hinar ikki fingu fyrrenn einar hundrað metrar seinni. Men tað var eingin ivi um, hvør var bestur. Á málinum var Gongurólvur meiri enn fýra bátslongdir frammanfyri Páll Fanga, sum aftur var leysur av Lómi á Argjum. Og so komu Smyril, Fortuna og Fuglfirðingur so at siga hvør fyri seg á mál.

– Vit rokna við at fáa væl størri kapping næstu ferð. Men vit fara at gera okkara fyri at varðveita oddasessin, sigur Inga Thorkildshøj.

# Kyndil og Sílið hoyra saman

**Havnardreingir vunnu mest sannførandi sigurin av øllum í teimum seks kappróðrunum leygardagin**


*Sílið við Kyndils dreingjunum á bekkunum var so langt fremstur av teimum átta dreingjamanningunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

5–MANNAFØR DREINGIR
*Jóannes Hansen*

Tað var einki, sum á fyrstu metrunum í fyrsta róðrinum leygardagin bendi á, at dreingirnir umborð á Sílinum skuldu gerast mest sannførandi vinnararnir á norðoyastevnu. Havfrúgvin úr Vestmanna, sum vann FM í 1999, fekk besta startin, og Tjaldrið, sum vann FM í 2001 og aftur í 2001, var væl við fyrstu løtuna.

Men tá ið hálvur teinurin var rógvin, var Sílið, sum í fjør var FM vinnari, væl frammanfyri hinar.

– Stýrimaðurin hjá okkum segði, at Havfrúgvin í startspurtinum var eina bátslongd frammanfyri okkum. Tað var ikki fyrrenn startspurturin var av, og vit róðu lunnaróður, at vit tóku Havfrúnna, og so gekk sera væl. Tá ið vit komu framvið Kósabrúnni ivaðust vit ikki í, at vit vóru væl frammanfyri vestaru bátarnar, sigur Sigtór Lützen.

Hann er bátsformaður umborð á Sílinum, og hann er royndasti maðurin umborð. Allir hinir, sum í fjør vóru við til at vinna FM, eru farnir av, tí teir vóru ov gamlir. Sigtór hevur mannað bátin av nýggjum, og hann hevur funnið mesta partin av bátsfeløgunum millum sínar liðfelagar:

– Vit eru fýra, sum spæla hondbólt við Kyndli, so vit kendust rættuliga væl, tá ið vit fóru undir venjingina. Vit hava vant síðani í januar. So í meiri enn tveir mánaðir var bæði hondbólturin og kappróðurin á skránni.

Sigurin á norðoyastevnu smakkar serliga væl hjá bátsformanninum,tá ið hann minnist aftur á árið í fjør.

– Tá vóru vit nummar fýra á norðoyastevnu, og vit vórðu kolldømdir á Skálafjørðinum. So vunnu vit tríggjar róðrar. Í ár hava vit so fingið betri start, enn vit fingu í fjør. Nú fáa vit at síggja, hvussu tað fer at roynast.

Kappingin um tey fýra plássini aftanfyri Sílið var rættuliga tøtt. Tað slitnaði ikki sundur millum Blik, Tjaldrið, Havfrúnna og Fípuna Føgru. Annað vikuskiftið fæst at síggja, um nakar av teimum fer at megna at gera nakað við Sílið, sum í Klaksvík var so nógv fremst.